# Lærari til føroyskt sum annaðmál



**Vegna økt virksemi søkir Miðnám á Kambsdali eftir lærara í føroyskum sum annaðmál.**

### Um starvið

Talan er um tímastarv í føroyskum sum annaðmál fyri útlendingar. Undirvísingin er ein ella tveir seinnapartar um vikuna, vanliga frá 16.15 – 19.30, men kann eisini vera onkran fyrrapart frá 8.30 – 11.25, um tað liggur fyri. Undirvísingin er summar dagar á Miðnámi a Kambsdali og aðrar dagar á Klaksvíkar HF-skeiði. Av og á er umløgd undirvísing við longri døgum ella kvøldundirvísing – eftir avtalu. Roknast kann við fundarvirksemi eftir vanliga skúlatíð 4 ferðir pr. lestrarhálvu.

### Førleikakrøv

Ynskiligt er, at tann, ið verður settur, hevur útbúgving sum lærari í føroyskum sum annaðmál. Royndir afturat kunnu vera ein fyrimunur. Eisini lærarar við øðrum førleikum, eitt nú við prógvi í føroyskum ella læraraprógvi við linjugrein í føroyskum og / ella við royndum á økinum, verða tiknir við í metingina um neyðugt.

### Lønar- og setanarviðurskifti

Talan er um tímalærarastarv, sum verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelagið Miðnám. Arbeitt verður í toymi saman við øðrum royndum lærarum.

### Freist

Umsóknir skulu vera Miðnámi á Kambsdali í hendi á ums@kambsdalur.fo í seinasta lagi mikudagin 22.01.2025 kl. 23.00. Starvið verður sett skjótast til ber.

## Spurningar

Spurningar um starvið kunnu setast Óla Wolles, útbúgvingarleiðara (olw@kambsdalur.fo / 742031), ella Christinu Jensen, samskipara (cje@kambsdalur.fo / 281535).